STUTT SAGT

## Nýggjar ferjur

Eitt norskt felag fer nú at byggja nakrar ferjur, sum skulu fáa fleiri ferðafólk at njóta náttúruna á teimum longu firðunum í Vesturnoregi.

Í fyrsta umfari er ætlanin at byggja tvær bilferjur, sum skulu sigla á Hjørundfjørðinum og Geirangerfjørðinum, og gongst sum ætlað fara tær í rutu í 2008. Skipini, ið verða bygd sum tvíkiljur, verða 44 metrar long, og kostnaðurin fyri hvørt skipið fer at liggja oman fyri 60 milliónir norskar krónur.

Á summum rutum skulu tær nýggju ferjurnar kappast við skip, sum longu sigla har, men reiðaríið ivast ikki í, hvør fer at vinna kappingina. Næstan allur yvi8rbygningurin á ferjunum verður úr glasi, og tað fer at geva ferðafólkunum heilt aðrar møguleikar enn teir, sum verandi skip bjóða, sigur reiðaríið.

## Atsókn var hevnd

Bumbuatsóknin á frítíðaroynni Bali í fjør var hevnd fyri teir muslimar, sum lata lív í Irak og Afghanistan. Tað segði ákærin, tá rættarmálið ímóti fýra víðgongdum monnum byrjaði í morgun.

Rættarmálið er tað fyrsta í sambandi við tilburðin í fjør, tá tríggir sjálvmorðsbumbumenn sprongdu seg og 20 onnur fólk í luftina. Indonesisku myndugleikarnir hava alla tíðina sagt, at tað var yvirgangsfelagsskapurin Jemaah Islamiyah, sum skipaði fyri atsóknini. Felagsskapurin heldur til í Landssynningsasia og sigst vera ein grein av al-Qaeda.

Verða teir fýra menninir funnir sekir, kunnu teir fáa deyðarevsing.

## Leita eftir sektleiðara

Í USA er samveldisløgreglan FBI farin at leita eftir Warren Jeffs, sum stendur á odda fyri teirri víðgongdu kristnu sektini Fundamentalist Church of Jesus Christ of Later Say Saints. Sektin var fyrr partur av momonska trúarsamfelagnum, men fór haðani, tá mormonararnir bannaðu monnum at hava meiri enn eina konu.

FBI sigur, at tann 50 ára gamli Warren Jeffs hevur millum 60 og 70 konur, og løgreglan hevur eisini illgruna um, at hann hevur havt kynsligt samband við eina gentu, ið er ov ung til slíkt.

– Vit gera alt fyri at fáa fatur á honum, sigur Tim Fuhrman hjá FBI við tíðindastovuna AP, men hann ásannar, at tað kann gerast trupult, tí eingin sigur seg hava sæð Warren Jeffs tey bæði seinastu árini. Løgreglan hevur lovað fólki 100.000 dollarar, um tey kunnu avdúka, hvar maðurin er, men higartil uttan úrslit.

## Loysir seg at vera bankastjóri

Stjórarnir í teimum stóru norsku peningastovnunum fingu rættiliga góða lønarhækking í fjør, skrivar Dagens Næringsliv.

Ta størstu lønarhækkingina fekk Finn Haugan, sum er stjóri í Sparbank 1 Midt-Norge. Í 2004 fekk hann 1,87 milliόn krónur í løn, men í fjør var lønin 2,21 milliónir krónur, og harumframt fekk hann 1,16 milliόn krónur sum samsýning fyri, at bankin hevði eitt gott ár í fjør, so hansara lønarhækking var heili 75 prosent.

Í meðal fingu teir norsku bankastjórarnir 14 prosent meiri í løn í fjør enn í 2004.

Best løntur er stjórin í Storebrand Bank, Per Kumle. Hann fekk 6,8 milliónir krónur í løn í fjør, og tað var 16 prosent meiri enn árið fyri. Næstur honum er Svein Aaser, stjóri í DnB Nor, sum fekk 6,125 milliónir krónur inn á lønarkontuna í fjør.

UTTAN ÚR HEIMI

# Fólkið í Darfur mist tolið



*Jan Egeland tosar við flóttafólk í Kalma-leguni. Løtu seinni mátti hann taka til rýmingar*

**ST-sendimaðurin Jan Egeland og fylgi hansara máttu taka til rýmingar, tá ill flóttafólk løgdu á tey. George W. Bush, forseti, mælir til at senda hermenn til Darfur at halda skil á.**

DARFUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Glaspetti fuku um oyruni á ST-umboðunum, tá ill flóttafólk brutu rútar í ST-bilunum, og trygdarmenn máttu hjálpa Jan Egeland burtur frá teimum illu flóttafólkunum.

Jan Egeland, sum samskipar alla neyðhjálp hjá ST, var komin til Datfur at visaa fólk um, at altjóða samfelagið hevur ikki gloymt tey. Men júst sum hann var í ferð við at greiða frá, rópti ein kvinna, at ein av tulkum hansara hevði verið hermaður hjá tí sera illa lýdda vápnaða Janjaweed-bólkinum, sum hevur beint fyri túsundtals fólki í Darfur tey bæði seinastu árini.

So var alt í einum ruðuleika. Fólk herjaðu á ST-bilarnar, og Jan Egeland visti sær eingi onnur ráð enn at taka til rýmingar. Tá avtornaði, lá ein av tulkum hansara eftirá, og seinni varð ein annar maður myrdur, tá ill flóttafólk herjaðu á eina løgreglustøð hjá afrikanska eindarfelagsskapinum.

### Hermenn til Darfur

Amerikanski forsetin, George W. Bush, segði í gjárkvøldið, at hann hevur biðið Kongressina játta 225 milliónir dollarar, sum skulu brúkast til neyðhjálp til Darfur, og í fyrsta umfari hevur USA lovað at senda 40.000 tons av mati og øðrum neyðsynjarvørum hagar.

Men sambært Bush er tað ikki nóg mikið við neyðhjálp. Teir 7.000 hermenninir hjá afrikanska eindarfelagsskapinum hava ikki megnað at tryggja frið í Darfur, og tí vil Bush hava ST at senda eitt friðarvarðveitandi herlið hagar. Ætlandi fer Condolleezza Rice, uttanríkisráðharri, at leggja áheitan forsetans fyri trygdarráðið hjá ST í dag.

# Dýr olja ger tey fátæku fátækari

**Tann høgi oljuprísurin kemur teimum fátæku londunum í Afrika og aðrastaðni illa við og er steinur oman á byrðu**

OLJUPRÍSUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Altjóða orkustovnurin IEA sigur, at í 2002 innfluttu tey afrikonsku londini sunnan fyri Sahara-oyðimørkina olju fyri 8,6 milliardir dollarar, men at í fjør var hetta talið oman fyri 24 milliardir dollarar. Í fjør var meðalprísurin á olju 55 dollarar fyri tunnuna. Nú er hann oman fyri 72 dollarar, og so mikið meiri mugu londini rinda fyri oljuna.

Fremsti búskaparfrøðingurin hjá Heimsbankanum, Francois Bourguignon, sigur við Aftenpæosten, at heldur oljuprísurin sær, fer oljan at kosta teimum fátæku londunum í Afrika einar 25 milliardir krónur meiri í ár enn í fjør. Bourguignon sigur, at tey seinastu árini hevur tann hækkandi oljuprísurin ikki havt so stóra ávirkan í teimum fátæku londunum, tí teirra egnu útflutningsvørur hava eisini fingið góðan og hækkandi prís. Men hetta tykist ikki vera so longur, og tí kann tann dýra oljan fáa álvarssamar avleiðingar, sigur hann.

Francois Bourguignon sigur, at fleiri afrikonsk lond hava lænt pengar til ta dýru oljkuna, men tað gongur ikki í longdini. Tí fer oljan at ávirka búskapin, og tað fáa tey fátækastu at kenna fyrst, sigur hann.